# FÍNT AT ARBEI



**FLAKAVIRKI** Tey munnu vera omanfyri 20, sum eru til arbeiðis á Norðfra her í Norðdepli henda illfýsa mikudagin í farnu viku. Millum tey er 21 ára gamli viðingurin, Esmar Hvannastein Sørensen sum hevur arbeitt her í skjótt tvey ár. - Hetta er eitt ótrúliga gott arbeiðspláss.

## Frá fiski til politi

Í summar eru liðin tvey ár, síðani Esmar byrjaði at arbeiða á Norðfra. Men tá er eisini liðugt við tí í hesum umfarinum.
Hann ætlar sær tá niður til Danmarkar í skúla. Í fyrstu syftu ætlar hann at taka HF-prógv, og síðani ætlar hann sær víðari á útbúgvingarleið.
- Og aftaná tað ætli eg mær inn á politi-skúlan, sigur hann spentur á málinum.
Men í dag má fyrst fyllast í enn eitt trøllakar. So kann hann hugsa víðari um framtíðina.